# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Avbyrging stríðir móti mannarættindum

Orðaskifti hevur í Føroyum tikið seg upp um fólk, sum í varðhaldinum sita avbyrgd. Tað er gott, at hetta orðaskiftið nú er byrjað hjá okkum. Avbyrging hevur í Norðurlondum søguligar røtur aftur til eina tíð, tá rættarlig siðvenja var at hava fangar sitandi "til bekennilsi", sum hetta fyribrigdi var nevnt. Henda skipan var broytt við eini nýskipan av rættargangskipanini í 1919. Við hesi nýskipan vóru seinastu leivdirnar frá einaveldistíðini lúkaðar burtur úr rættarskipanini. Hetta at lata varðhaldsfongslað sita avbyrgd er eitt slag av trýsti og revsing at leggja á tey, sum sita.

Tað er alkunnugt, at avbyrging í varðhaldi kann elva til sálarligar sjúkur, angist og niðurníving ella depressión. Henda skipan við at hava varðhaldsfongslað avbyrgd í longri tíðarskeið hevur elvt til hvassar atfinningar frá altjóða mannarættindafelagsskapum mótvegis Danmark og við hesum má ásannast, at atfinningarnar sostatt eisini eru vendar ímóti okkum. Amnesty International í Føroyum hevur nú eisini verið frammi við atfinningum og eitt nú víst á, at einki veruligt eftirlit er við avvarandi myndugleikum við atliti at avbyrging í varðhaldi.

Avbyrging í varðhaldi tykist í demokratiska heiminum, so løgið tað ljóðar, at vera eitt norðurlendskt fyribrigdi í og við at henda skipan í so stórt mát at kalla bert verður nýtt í Norðurlondum. Í flestu europeisku londum er eins og hjá okkum sett eitt evsta mark fyri avbyrging í varðhaldsfongsli, og er hetta mark millum fimm og tjúgu dagar, sum er nógv lægri enn aktuellu norðurlendsku mørkini.

Við hesum bakstøði er skjótt at staðfesta, at vit í ríkisfelagskapinum eru langt frá tí, sum er galdandi í europeiskum fólkaræðisligum londum. Danskir myndugleikar hava ásannað, at støðan er ikki haldgóð, og eru rættarreglurnar tí broyttar við tí endamáli, at nógv færri eiga at sita avbyrgd. Hóast hesi løgfrøðiligu framstig upplýsir eitt nú heimasíðan hjá DR, at støðan er lítið og einki broytt til tað betra. Evsta markið er lækkað úr trimum mánaðum niður í átta vikur, men serreglur gera tað møguligt at fara út um nýggja markið. Hesar serreglur snúgva seg um yvirgang, rúsevnismisbrot v.m.

Talið á avbyrgdum í Danmark er at kalla óbroytt. Hóast evstamarkið er lækkað, er hetta samanborið við onnur fólkaræðilig lond sum Spania, Bretland og Holland framvegis alt ov høgt. Tað stutta av tí langa er, at tað í ríkinum enn sum áður sita eins nógv varðhaldsfongslað fólk í avbyrging. Avbyrging er ein avoldað skipan, sum ikki sampakkar við eitt demokratiskt rættarsamfelag. Avvarandi myndugleikar eiga tí skjótast at taka hetta mál upp á røttum staði fyri at fáa hesa inhumanu skipan broytta.

**Sosialurin**

# Kunna um ov tíðliga fødd



**Mikudagin 16. apríl skipar Prematur felagið fyri fyrilestri, har ljós verður varpað á teir trupulleikar, sum ov tíðliga fødd børn kunnu fáa at dragast við**

**FYRILESTUR**
*Tíðindaskriv*

Prematur-felagið varð stovnað í fjør heyst, og er endamál felagsins at hjálpa foreldrum at børnum, sum eru fødd ov tíðliga. Í Føroyum finnast ikki hagtøl fyri hetta, men í Danmark verður sagt, at 6% av børnum verða fødd ov tíðliga.

Fyrilesturin mikukvøldið er fyrsta tiltakið, sum felagið skipar fyri, og er tað Jonna Jepsen úr danska Preem Team, sum fer at halda fyrilesturin, ið er ætlaður bæði foreldrum, avvarðandi og fakfólki. Fyrilesturin verður hildin í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum klokkan 17.

Jonna Jepsen átti sjálv tvíburar í 1992, og komu hesir í verðina tríggjar mánaðir ov tíðliga. Síðani 1994 hevur hon arbeitt við teimum trupulleikum, sum prematur børn hava. Hetta við serligum atliti til sálarligu og sansamotorisku seinfylgjurnar, sum hesi kunnu fáa. Hon var í 2000 við til at stovna danska Prematur felagið, og var hon eisini formaður í felagnum fyrstu árini, eins og hon rekur Preem Team (www.preemteam.dk), sum rekur kunningarvirksemi viðvíkjandi ov tíðliga føddum børnum. Eisini hevur hon skrivað fleiri bøkur um evnið.

**Tiltakið er ókeypis**

# Føroyar við í dagføring av norðurlendskum tvískattasáttmála

**Føroyar hava undirskrivað eina dagføring av norðurlendska tvískattasáttmálanum. Mest týðandi broytingin fyri Føroyar er, at rætturin til skatting av eftirlønum nú er býttur millum keldulandið og bústaðarlandið**

**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**

Norðurlendski tvískattasáttmálin frá 1996 er nú dagførdur. Hetta hendi í Helsinki tann 04. apríl 2008, tá ein protokoll til norðurlendska tvískattasáttan varð undirskrivað.

Nýggja protokollin hevur við sær broytingar í reglunum um vinningsbýti, kapitalvinning, eftirlønir og inntøku frá arbeiði umborð á flogfari, harumframt eru broytingar í reglunum um sínámillum avtalumannagongd.

Ein av týðandi broytingunum fyri Føroyar er á eftirlønarøkinum. Áðrenn dagføringina av tvískattasáttmálanum varð skattur av eftirlønum goldin í keldulandinum, t.v.s., har eftirlønin er vunnin. Við nýggju reglunum verður skatturin av eftirlønum býttur millum keldulandið og bústaðarlandið.

Norðurlendski tvískattasáttmálin er ein multilateralur tvískattsáttmáli millum Danmark, Finnland, Føroyar, Ísland, Noreg og Svøríki, og hann er tann einasti av sínum slag í heiminum.

Jákup Eyðfinn Kjærbo, løgfrøðingur á TAKS, hevur verið føroyskur samráðingarleiðari og undirskrivaði sáttmálan vegna landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Protokollin, sum krevur góðkenning frá Løgtinginum fyri at verða sett í gildi í Føroyum, verður løgd fyri Løgtingið í næstu tingsetu.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.